**Føroya Óðalsfelag**
**Boks 2080**
**165 Argir**

# TÍÐINDASKRIV

Føroya Óðalsfelag mælir staðiliga ímóti tilmælinum, sum komið er frá nøkrum av limunum í nevndini, ið sett var at gera tilmæli um búnaðarlógir og landbúnaðarpolitikk.

- Tilmælið er _meira forering enn privatisering_. Ein afturlatin skari av fólki skal fáa framíhjárættindindi til helvtina av jørðini í Føroyum, uttan tó at fáa fullan fyrimun av privatum ognarrætti.
- Tilmælið loysir ikki trupulleikan við rættindum til traðir, við felagshøgum, við smáum festum ella trupulleikan av matrikullógini.
- Tilmælið ger onki fyri at røkka málinum um stundningsfría vinnu, og tey búskaparliga ivasomu sjónarmið meirilutans eru ikki send til ummælis hjá búskaparráðnum ella teimu, ið sita og fyrireika einskiljing av landsfyritøkum.
- Tilmælið er skilaleyst og óumhugsað, tá ræður um nærri ásetingar og treytir, sum eisini umboðið fyri búnaðargrunnin vísti á.
- Óðalsfelagið hevur enn ikki havt høvið at viðgjørt kunngjørda uppskotið frá meirilutanum, tí formaðurin í bólkinum valdi ikki at geva okkum stundir og umstøður til tess.
- Óðalsfelagið fer at biða løgtingsins umboðsmann kanna arbeiðsgongdina í bólkinum. Arbeiðið í bólkinum hevur frá byrjan veið út av lagi illa skipað, og góður fyrisitingarsiður fyri slíkt arbeiðið er brotið. Frá byrjan valdi formaðurin at bróta arbeiðssetningin og fara nógv longur enn vinnumálaráðharrin hevði ásett, fundarætlan var ongantíð løgd, uppmøting av tí sama trupul, fundir og fundarfrásagnir illa skipaðar, og roynt var bert at fáa blástemplað eina skipan, sum ger lívið lættari fyri búnaðarstovuna og letur av hondum landsins jørð uttan viðurlag og uttan at bøndur fáa fullan fyrimun av privatum ognarrætti.
- Óðalsfelagið væntar ikki, at Vinnumálaráðið fer at leggja fram uppskotið frá meirilutanum, men mæli í staðin til, at tey uppskotini, ið óðalsfelagið hevur gjørt, og sum halda seg til tann arbeiðssetning, ið bólkurin frá byrjan fekk frá Vinnumálráðharranum, verða løgd fram.
    - at selja bóndum fjós, sethús og bygningar,
    - at selja smáu festini,
    - at selja traðirnar,
    - at selja kommunum ta jørð, ið skal brúkast til almenna útbygging.
- Óðalsfelaigð heldur, at tað rætta at gera, er at viðurkenna, at tey fullriknu vinnuligu jarðarbrúkini fara at fækkast niður í 10-20 brúk við mjólkineytum og nakað sama tal við seyði burturav.
- *Aðalorðaskifti eigur at verða hildið á løgtingi um hvat landið skal gera við meginpartin av jørð síni, ið ikki verður rikin sum vinnuligur landbúnaðar.*
- Óðalsfelagið harmast mest um, at enn einaferð er eitt arbeiðið gjørt til fánýtis. Tann einasta broyting, ið er hend seinastu mongu árini er, at vit fingu tveir stovnar fyri ein at umsita almennu jørðina.

Kári á Rógvi, formaður

:/: hjálagt ávegis minnilutaálit okkara